# VB skipar fyri stuðulsrenning

**Í dag klokkan 14 skipar VB fyri stuðulsrenning. Í Vági er vakurt vatn og er ætlanin at leikarar fara at renna kring Vatnið. Í VB-húsinum verður vedding á skránni, eins og VB bjóðar ein kaffimunn og køkur. Felagið fer væntandi í næstum at skriva sponsoravtalu við Suðuroyar Sparikassa**

ÍTRÓTTUR
*Dagfinn Olsen*



*VB leikarar fara í dag at renna stuðulsrenning kring Vatnið*

*Mynd: D. Olsen*

Vágbingar fáa høvi at stuðla VB í dag, leygardagin, tí klokkan 14 skipar felagið fyri stuðulsrenning og hugnaløtu.

Leikarar úr 1. deild og 2. deild, eins og unglingar, far at renna kring Vatnið. Fólk hava á stuðulsbløðum høvi at tekna seg fyri ávíst gjald, 5 ella 10 krónur t.d., fyri hvønn kilometur ein leikari rennur.

Leikarar hava útvegað sær ein ella tveir stuðlar, eins og stuðulsbløðini hava ligið í handlum og vitjað hevur eisini verið í húsini at vita, um áhugi er at stuðla.

Talan er um eini 30 leikarar, ið fara at renna í ein tíma, ella so. So skal metast um, hvussu nógvar kilometrar einstaki rennarin rennur.

Meðan runnið verður, skipar VB fyri hugnaløtu í VB-húsinum. Kaffi og køkur eru at fáa ókeypis.

Men í VB húsinum verður eisini skipað fyri vedding, ið snýr seg um at gita, hvussu nógvar kilometrar runnið verður tilsamans.

### Skriva brátt sponsoravtalu

Tiltakið er til frama fyri virksemi felagsins. Felagið ásannar, at nógvur peningur skal til at reka felagið. Vágbingar hava langa leið at ferðast í samband við dystir og hetta ger ikki raksturin bíligari.

Felagið vónar, at vágbingar taka undir við tiltakinum.

Samstundis, sum felagið fær nakrar krónur í kassan, so er hetta ein hugnaløta og eitt byrjanartekin um, at kappingin er í hondum og harvið eitt sera spennandi fótbóltssummar, ið krevur sítt.

VB fer væntandi í næstum at skriva sponsoravtalu við Suðuroyar Sparikassa.





Heimurin broytist hvønn einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.

Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving , sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið

Handilsskúlin gevur tær bæði møguleikan fyri framhaldslestri og vinnuførleika.

Ring til okkara ella støkk inn á gólvið, um tú vilt vita meira um um Handilsskúlan.

Marknagilsvegur 77,
Postsmoga 177, FO-110 Tórshavn
Tel 31 71 77, www.fh.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI

Kambsdalur, FO-530 Fuglafjørður
Tel 444 900, www.fh.fo


# Grækarismessuhald í Vági

**Vanligt er, at grækarismessa verður hildin kring landið at heilsa tjøldrunum vælkomnum. Eisini í Vági verður tjóðfuglurin heilsaður og sum vant skipa skótar og Kirkjukóri Ljómur fyri**

TÍÐINDASKRIV

Sunnudagin klokkan 16 skipa grønu skótarnir í Vági og Kirkjukórið Ljómur fyri grækarismessuhaldi við minnisvarðan.

Grønu skótarnir hava í mong ár skipað fyri hesum haldinum saman við Ljómi, eins og skipað verður fyri flaggdagshaldinum.

Vanligt er, at Ljómur sett dám á haldið við sangi, eins og felagssangur er á skránni. Hóast vónir eru um gott veður, so er ilt at spáa um hetta, tí føroyska veðurlagið er skiftandi. Men um veðrið ikki verður eftir vild, so verður tiltakið innandura, nevniliga í Framtíðini. Í ár heldur Dagfinn Olsen grækarismessurøðuna.

### Til Íslands

Grønu skótarnir í Vági eru eitt skótalið, ið stavar heilt afturi frá 1940. Liðið er triðelsta skótalið og triðstørsta lið í Føroyum. Hesum eru tey ikki sørt errin av, um hugsað verður um mótburðin, ið Vágur hevur verið fyri.

Skótarnir eru í fer við at savna sær pening til eina ferð til Íslands í summar. Skipað verður javnan fyri tombola og tann 30. mars verður marknaðardagur í Skótahúsinum. Har verður nýtt og gamalt at fáa, eins og kaffi, køkur, poppkorn og annað.

Skótamanningin, ið ætlar sær til Íslands, er hin sama, sum nakað her fyri gekk Suðuroynna úr enda í annan. Ætlanir eru um aðrar útferðir í næstum, t.d. til ymisk forkunnug støð nærhendis Sumba, so skjótt viðrar.



# Fiskaroykur umborð á Sæborg

**Í gjáramorgunin klokkan 9.45 Sæborg rokaður til Klaksvíkar. Teir høvdu verið burtur í góð tvey samdøgur, og arbeitt hevur verið í døgndrift**

REPORTASJA
*Ingrid Bjarnastein*



**Klaksvík:** Sjaskveður er. Regn og kavin er við at fara burtur aftur. Glaðurok á sjónum. Norðuri á uppboðssøluni er nógv at gera. Nakrir eru bátarnir, sum eru komnir inn at landa, og reyði báturin liggur tungur fram við kaikantinum. Týðiliga sæst, at her hevur verið góður fiskiskapur.

Ein appelsinfarvaður maður rættir hondina fram, og nú er sloppið. Nú eru vit umborð. Fiskaroykurin er sterkur. Niður í messuna. Har situr skiparin. Ein vælvaksin maður. Brillur og gráur um vangarnar. Tað slepst ikki undan, at hann sær eitt sindur troyttur út, men hetta er ongin forðing. Hann er fryntligur og ógvuliga prátingarsamur. Vit sessast við borðið.

– Vit fóru út fyri góðum umleið tveimum døgum síðani, sigur Zacharias Zachariassen, skipari. – Vit hava ligið norðuri úr Fugloynni, í Geiranum, sum tað verður kallað.

Sæborg fiskar tosk, hýsu, flat fisk – alt møguligt, greiðir skiparin frá. Hendan túrin hevur verið arbeitt døgnið runt, tí fiskiskapurin hevur verið stak góður.

– Tað er hart, og nú eru menn troyttir. Uppá seks dagar hava vit fingið umleið 13.000 kassar, sum er ógvuliga gott, fortelur Zacharias.

### Ongan svøvn

Sæborg landaði á Klaksvík týsdagin, og onkur var, sum ikki slapp heimaftur áðrenn báturin fór útaftur. Komið var til lands klokkan 14, og longu klokkan 23 var farið útaftur. Tá fiskiskapurin er góður, verður siglt, sum ein pendul inn og út.

– Vit koyra rættiliga hart á, og tað hava verið nógvar góðar løtur. Men hann hevur viðrað so illa, so ikki hevur borið so væl til, sum vit kanska høvdu ætlað.

Fimm mans eru umborð á Sæborg. Og hesin túrurin hevur verið strævin. Meðan vit sita og práta í messuni, kemur onkur inn, og prátar eitt sindur við, og sleppur sær útaftur. Ongin vil rættiliga blanda seg uppí prátið.

– Lítið hevur verið av svøvni hendan túrin, so nú eru menn av góðum orsøkum troyttir, greiðir skiparin frá. – Teir hava fingið onkran tíma av og á. Soleiðis er tað bara, tú venur teg við tað.

Etið verður júst sum tað passar. Onkuntíð er døgurði klokkan 10 á morgni, og onkuntíð klokkan fimm seinnapartin. Tá fiskiskapurin er góður sum hesuferð, so er heitur matur á skránni minst tvær ella tríggjar ferðir um dagin.

Kokkurin sær ikki út, sum flestu kokkar vit kenna frá fiskibátum. Hann hevur ikki ein stóran búk at hjúkla um. Nei, heldur tvørturímóti.

– Ja, kokkurin arbeiðir eisini sum dekkari. Hann fer so burturfrá viðhvørt, og so royni eg at hyggja til matin, sigur Zacharis, meðan hann rullar sær eitt ball – Samson.

### Rokaður

Vit fara ein túr runt umborð á Sæborg. Lítið er, og fiskaroykurin er allastaðni. Vit fara ein túr inn í kahyttirnar. Har eru seks koyggjur – allar tómar. Skiparin fortelur, at teir fingu ein stóran sjógv niður í kahytturnar. Hurðin var opin, og nógv vatn kom niður. Nógv pláss er ikki at taka av, men hóast hetta, so er ein hugnaligur dámur. Hvør maður kann draga gardinurnar fyri, og so hevur hann sína egnu lítlu verð.

So gongur leiðin út á dekki. Har eru fiskar, og skiparin peikar inn í lastina. Hon er so full, sum hon yvirhøvur kann vera. Vit ganga eitt sindur longur fram. Har er eitt annað rúm, har fiskakassar eisini standa stápladir. Hetta rúmið verður nýtt tá so nógvur fiskur er, at tað ikki er pláss fyri honum í lastini. Men tó, fiskaprísirnir eru dalaðir nógv í seinastuni, serliga toskurin.

Vit fara upp í stýrhúsið. Eisini har er ógvuliga lítið, júst sum í restini av skipinum. Meistarin situr har uppi, og vit fáa okkum eitt lítið prát. Hóast trongu umstøðurnar duga menn væl at finna seg í tí.

Sæborg fer út aftur tá veðrið batnar. Eg takki fyri meg, og klintri upp um lúnningina. Føturnar eru aftur á fastari jørð. Viðganga skal eg tó, at hetta kennist betri enn at tá alt vaggar undir tær. Men skiparanum dámdi tað væl. Sigur, at hetta er hart lív, men hóast alt ikki so galið.


